**Góðu foreldur, avvarandi og næmingar**

Í samband við eldsbrunan mánadagin, senda vit tykkum hetta skriv, sum er eina frágreiðing um, hvat hendi í samband við eldsbrunan.

Fáa vit meira at vita, so verður kunnað um tað tá.

Tað er eingin frágreiðing komin um, hvat orsøkin var til eldin. Tað er bert materiellur skaði og verður hetta gjørt í stand aftur sum skjótast.

Vit ynskja at takka øllum, sum á ein ella annan hátt, hava hjálpt okkum ígjøgnum hesar dagarnar. Vit eru sera takksom. Eingin nevndur, eingin gloymdur.

*Viðheft eru tvey skjøl frá Sernám. Eitt um "Reaktiónir hjá børnum" og hitt er "Stuðul til børn eftir álvarsligar hendingar". Vit fara at heita á foreldur um at lesa hetta.*

**Frágreiðing:**

**Mánadagur 9. septembur**

Mánamorgunin umleið kl 9.00 verður eldur staðfestur á vesinum við vestaru inngongd við fimleikahøllina. Tað eru fólk, sum eru á gongini, beint við vesið, sum fyrst merkja og síggja roykin og boða hinum frá.

**Kl. 9.04** verður ringt 112, samstundis verður allur skúlin evakueraður. Flokkarnir verða samlaðir í garðinum, har ein teljing verður gjørd beinavegin. Forskúlin brúkar protokol, meðan skúlin brúkar Kervi (elektronisk protokol) – bæði eru førd frá morgunstundini og tí vita vit neyva næmingatalið.

**Kl. 09.07** tosa vit við vaktcentralin og siga, at øll eru komin út, og at portrið inn í garðin er latið upp. Tvey starvsfólk hava verið á staðnum, har eldurin kyknaði, við brandsløkkjarum og gjørt sítt fyri at sløkkja eldin.

**Kl. 09.16** kemur brandbilur, løgregla og sjúkabilur á staðið. Brandmenninir fara í gongd við at sløkkja eldin, men skjótt staðfesta teir, at lítil og eingin eldur er, men sera nógvur roykur. Løgreglufólki og brandmennirnir ganga runt millum næmingar og starvsfólk fyri at sissa tey.

Tá brandmeistarin metir tað vera ráðiligt, fara starvsfólkini inn eftir skóm, jakkum og taskum hjá næmingunum og tey verða gjørd klár at fara í bussin. Vit hava ringt eftir Paula og Jóhan Sigurd, busssjaførunum, um at koma at koyra næmingarnar burtur frá skúlanum og yvir í Bylgjuna, har foreldur fáa boð gjøgnum facebookbólkar um at koma eftir næmingunum. Eisini varð kunning løgd út á rks.fo og runavik.fo.

Starvsfólk og leiðsla eru á staðnum til allir næmingar eru heintaðir.

**Kl. 12.00** eru øll starvsfólkini hjá Glyvra skúla samlaði í Kommunuskrivstovuni, har brandmeistarin, borgarstjórin, starvsfólk hjá kommununi og leiðsla skúlans taka samanum. Vit fáa at vita, at alt, sum er gjørt, er gjørt rætt.

**Týsdagur 10. septembur**

Kl. 8.00 møta øll starvsfólkini við Løkin, har vit fáa eitt upplegg frá sálarfrøðingini um, hvussu vit skulu handfara næmingarnar gjøgnum dagin.

Tilmælini eru heilt greið. Lat børnini spæla og røra seg nógv og tak prátini, sum tey koma. Nøkur børn hava tørv á at práta og at verða uggað, meðan onnur einki merkja. Tað hevur týdning, at vit ikki práta støðuna upp aftur, men heldur lata børnini koma til orðana.

Kl. 9.00 møta øll í Bylgjuni, har vit hava ein góðan morgunsang og síðani nøkur dansispøl í høllini. Næmingarnir sleppa at spæla í høllini og Bylgjuni.

Kl. 11.40 verða næmingarnir heintaðir og koyrdir í Frítíðarskúla.

**Mikudagur 11. Septembur**

Skúlin er blivin vaskaður, so skúlagongdin kann vera tikin uppaftur.

Prát er í flokkunum, og næmingar, sum hava hug, kunnu síggja staðið, har eldsbrunin var, men tað er einki krav.

Bræv er sent foreldrum, sum kunnar um støðuna.

Leiðslan í Runavíkar Kommunuskúla